# E - og tónleikurin



**Torkil Johannesen, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Ja

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Nei

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Tónleikur ger meg kreativan

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Umleið 300 plátur og 100 fløgur.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Í løtuni er tað DVD diskurin Hell Freezes Over hjá The Eagles.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Allar .

Hvør sangur skuldi ongantíð *verið skrivaður?*
– Komi ikki í tankar um nakran.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Gary Glitter.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Onkran, sum eg dugi.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Tað kann verða so nógv t.d. unplugged fløgan hjá Eric Clapton .

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Ongan, tá vilja míni tinnitus oyru hava frið.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Komi ikki í tankar um nakran.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Allur tónleikur.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Vit áttu í 60'unum eina plátu við Everly Brothers, sum ofta bleiv spæld.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava veri? vi? til at gjørt ella spælt inn?*
– Eg haldi, at alt, sum eg havi gjørt í studio, kundi verið betri spælt/sungið.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Hugsi ikki um slíkt.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Blast, fyrsta konsertin við Mezzoforte í Norðurlandahúsinum, Level 42, ToTo og fleiri aðrar.

*Hvønn tónleikara hevði tú vilja hitt?*
– Jeff Porcaro.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Stefan í Skorini, mailto:skorini@gjk.dk
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Kongaligt brúdleyp

Danmark er á gosi. Tað kongaliga brúdleypið stendur í skrivandi stund fyri durum. Tá háttvirdi lesarin lesur hetta teldubræv, er brúdleypið farið afturum bak – tíbetur vildi onkur sagt.

Ekstrablaðið metti, at tann danski skattgjaldarin skuldi rinda 150 milliónir krónur bara fyri hetta eina brúdleypið. DR hevði eina heldur varligari meting við 142 milliónum krónum, sum verða brendar av í hesum døgum.

Tá er alt roknað við. Trygdartiltøk, framsýningarnar hjá verjuni, útreiðslur hjá sjónvarpsrásunum og tann hálvi frídagurin, danska stjórnin hevur givið øllum alment settum starvsfólkum, so at tey kunnu fara at heilsa uppá Frede og Mary ella fylgja við í sjónvarpinum, o.s.fr. Tað danska kongshúsið kostar 200 milliónir krónur um árið. Kundi man ikki nýtt peningin til okkurt annað meira skilagott?! Nei, halda flestur danir og stjórnin.

Navnframi tíðindamaðurin á TV 2, Jes Dorph-Petersen, sum hevur verið vertur í fleiri av sendingunum um brúdleypið, segði við eitt av teimum donsku bløðunum, at tað er blivið politiskt korrekt at gremja seg um ta ovurstóru umtaluna, hetta brúdleypið fær í fjølmiðlum, og um tær ovurstóru peningaupphæddirnar, sum verða nýttar. Eg fari at gera tað kortini.

Hvat er tað, sum ger, at fólk hava eina ómettandi trongd eftir at síggja brúðarparið? Hví hevur tað danska fólkið so stóran áhuga fyri hesum? Ein spurningur, sum onkur sálarfrøðingur møguliga kann svara.

Tá eg var tólv ára gamal fór eg onkuntíð niðan á Hotel Føroyar at fáa autografar frá heimskendum fótbóltsleikarum so sum Ryan Giggs og Ian Rush, ið skuldu spæla landsdyst ímóti Føroyum. Nú eri eg ikki tólv ár longur og eri vaksin frá tí. Men eingin veksur frá kongshúsinum. Fólk ferðast langa leið bara fyri at síggja tey kongaligu.

Tað er stórur meiriluti í danska fólkinum, sum tekur undir við, at Danmark skal hava eitt kongshús. Republikanararnir eru í stórum minniluta, hóast teir royna at rópa eitt sindur, nú tað royala hysteríið er farið yvir gevind.

Sjálvt ikki Holger K. Nielsen úr SF tordi ikki at gera vart við sína mótstøðu av monarkinum, tá giftarmálið var fyri í Fólkatingum. Axel Larsen, stovnari av Socialistisk Folkeparti, hevði vent sær í grøvini. Hann gjørdi nevniliga vart við sína ónøgd, tá Margreta Drotning skuldi giftast í 1967.

Men í næstu viku er hetta tíbetur yvirstaðið, og vit kunnu venda eyguni ímóti EM í fótbólti í Portugal. Tá fer onkur annar at gremja seg um, hvussu nógva senditíð og hvussu nógva umtalu fótbólturin fær í fjølmiðlunum.



VM-hingsten
Kjarni frá Tyrevoldsdal
Toppen i avl




Stutteri Tyrevoldsdal

GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Nýggjar
TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan

Lloyd's Register - Føroyar
"Ship/Engineer Surveyor"

Lloyd's Register EMEA, er partur av Lloyd's Register Group, og er eitt leiðandi óheft klassingarfelag, ið hevur virksemi um allan heimin. Vit sóknast eftir umsøkjarum til skrivstovu okkara í Føroyum. Starvið er egnað fólki við hollum kunnleika til føroyska vinnu, serliga farma- og fiskivinnu, ið halda avbjóðingar eru spennandi.

Starvslýsing:
Marknaðarføra verandi og nýggjar tænastur til sjóvinnuna. Gera sýnsarbeiði fyri Lloyd's Register samsavarandi reglum og avtalum.

Førleiki:
- Maskinverkfrøðingur, skipsverkfrøðingur ella líknandi útbúgving
- Í minsta lagi 5 ára royndir innan sjóvinnuna, tað verði seg skipabygging, teknistovuarbeiði ella innan leiðslu í einum shipping felagi
- Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin er kunnugur við ISO, ISM og ISPS leiðsluskipanir
- Duga væl enskt, bæði munnligt og skrivligt. Alt innanhýsis samskifti er á enskum
- Duga væl føroyskt
- Teldukunnleika í at nýta Microsoft Windows / MS office
- Sjálvstøðugur, skil fyri handilsskapi og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tað gerst neyðugt

Setanarviðurskifti:
- Eitt áhugavert, spennandi og sjálvstøðugt arbeiði
- Góð løn
- Eftirløn og aðrar ágóðar

Áhugaðir umsøkjarar:
Vinarliga sendið okkum eina umsókn og CV, har greitt verður frá, hví tygum meta, at tygum eru egnaður til hetta avbjóðandi og spennandi starvið hjá Lloyd's Register EMEA.

Umsóknin skal sendast Field Operations Manager, Alf Pearson, á bústaðinum niðanfyri ella til teldupostbústað copenhagen@lr.org, í seinasta lagið 1. juni 2004. Vinarliga setið tygum í samband við Alf Pearson á telefon +45 32961800, um tygum ynskja fleiri upplýsingar.

Lloyd's Register Group er eitt óheft felag, ið arbeiðir fyri at betra um góðskuna, trygdina og umhvørvis- og handilsligu úrslitini hjá okkara viðskiftafólkum kring allan heim. Royndir og virksemi okkara eru innan sjóvinnu, olju & gass, jarnbreytir og aðrar vinnur. Fleiri upplýsingar eru at finna á www.lr.org.

Lloyd's Register EMEA
Strandvejen 104A
DK - 2900 Hellerup

Lloyd's Register

Almennur fundur um fyrra Flaggdagsálit

Almennur fundur um Fyrra Flaggdagsálit verður í høllum Starvsmannafelagsins mánadagin 17. mai 2004 kl. 19.00.

Jóan Pauli Joensen og Kári á Rógvu leggja fram.

Helgi Winther Poulsen setur fram spurningar og hugleiðir um Fyrra Flaggdagsálit.

Møtið fjølment.

Tjóðveldisflokkurin

Slaktari

Søkt verður eftir slaktara til slaktaradeildina í Keypssamtøkuni í Hoyvík, at byrja um l. 7. juni 2004, ella eftir avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv – handverkaraløn.

Meira fæst at vita um starvið hjá slaktarameistaranum, Lars Hansen, tlf. 314149.

Umsókn skal sendast til **FK Hoyvík, box 349, 188 Hoyvík**, innan 24. mai 2004.

Keypssamtøkan í Hoyvík